# PUBLIC SERVICE FRÁGREIÐING FYRI 2017



KRINGVARP FØROYA

Innihald . . . . . . . . . . 2
Formæli . . . . . . . . . . 3
KVF framleiðslur í tímum . . . . . . . . . . 5
Álit . . . . . . . . . . 6
Aktuelt . . . . . . . . . . 8
Mentan og Samfelag . . . . . . . . . . 12
    Sjónvarp . . . . . . . . . . 12
    List . . . . . . . . . . 12
    Undirhald . . . . . . . . . . 13
    Útvarp . . . . . . . . . . 13
Ítróttur . . . . . . . . . . 14
Átrúnaður . . . . . . . . . . 15
Barnaøkið . . . . . . . . . . 16
    Barnaútvarpið . . . . . . . . . . 16
    Barnasjónvarpið . . . . . . . . . . 17
Røddin hjá teimum ungu . . . . . . . . . . 18
Tónleikur . . . . . . . . . . 19
SavnsGull . . . . . . . . . . 20
Kringvarp Føroya á sosialum miðlum . . . . . 22
Heimasíðan dagførd . . . . . . . . . . 23
Public Service skyldur hjá KVF . . . . . . . . . . 24
    Føroyskt mál í Kringvarpi Føroya . . . . . . 24
    Týtt útlendskt tilfar . . . . . . . . . . 24
    Tænastur til fólk við breki . . . . . . . . . . 24
    Sendingar úti um landið . . . . . . . . . . 24
    Keyptar framleiðslur . . . . . . . . . . 25
    Førleikamenning og dygd . . . . . . . . . . 25
    Partur av tilbúgvingini . . . . . . . . . . 25
    Undirvísing . . . . . . . . . . 25

# Miðlaheimurin í broyting – eisini KVF

Fýra av fimm føroyingum hugdu at sendirøðini Gud signi Føroyar, ið varð send í vár, men framleidd í 2017. Fyrr var einki óvanligt í, at so stórur partur av hyggjarunum hugdi at eini sjónvarpssending. Men í dag megna vit sjáldan at savna tjóðina um eitt samfelagsliga viðkomandi og djúpt evni sum átrúnaðarligu rørslurnar í Føroyum. Sendirøðin gjørdi okkum eisini klókari upp á, hvørjir spurningar skilja okkum sum einstaklingar og bólkar. KVF skal upplýsa og undirhalda Føroya fólk við tí fyri eyga, at vit sum borgarar eru virkin í dagsins samfelagi á einum upplýstum grundarlagi. Samstundis vilja vit eisini vera djørv, bjóða av og viðvirka til kjak um týðandi spurningar. Tað var hendan sendirøð dømi um.

Miðlaheimurin er annars í eini broytingartíð, har útbreiðslan av nýggjari tøkni gongur við rúkandi ferð og broytir miðlanýtsluna. Rákini í grannalondunum fara við vissu eisini at raka okkum í Føroyum. Vit verða rakt av eini herdari altjóða kapping um uppmerksemi frá brúkarum okkara. Miðlapallar sum Facebook, Netflix, YouTube, Spotify og iTunes fara avstað við tíð teirra. Eitt nú vísa tøl frá Facebook, at áleið 33.000 føroyingar hava ein vanga hjá teimum.

Harnæst er ein vaksandi gjógv millum ættarliðini í teirra miðlanýtslu. Í øllum Norðanlondum sæst ein týðuligur munur millum, hvussu tey ungu (15-25 ára gomul) einamest fáa sín miðlatørv nøktaðan á netinum, meðan tey eldru (+40 ár) framvegis einamest brúka siðbundnu miðlarnar. Ein kanning, sum Lóður hevur gjørt av miðlanýtsluni í Føroyum á sumri 2017 staðfesti somu rák: Bert 19% av teimum 15-29 ára gomlu lurta dagliga eftir útvarpstíðindunum, meðan 75% av teimum 45-59 ára gomlu lurta dagliga. Ein stórur partur av teimum ungu lurtar tó framvegis regluliga, tí 45% av yngsta aldursbólkinum lurta minst 3-5 ferðir um vikuna eftir útvarpi okkara, meðan 90% av teimum eldri enn 45 ár lurta so nógv.

Álitið á miðlar er fyri hóttafalli. Altjóða kanningar vísa, at eitt nú *fake news* og *click bait* greinar máa undan álitinum á miðlarnar. Lítil ivi er um, at vit í Føroyum eisini eru rakt av hesum ráki. Spurnarkanningar hava tó víst, at álitið á KVF bøttist í 2017. Álit er grundleggjandi fyri fólkaræðisligu samrøðuna. Tí seta vit eisini áhaldandi høg krøv til okkum sjálvi og okkara virkisføri. Fjaldar dagsskráir eiga ongan góðan í KVF.

Í 2017 varpaðu vit ljós á nógv ymisk økir á ymsu pallum okkara. Tíðindafólk okkara vóru á staðnum, tá Varðin Pelagic brann í juni. Sendingar fóru í dýpdina við stóru politisku nýskipanunum, ið vóru á breddanum. Bæði fiskivinnunýskipan, pensjónsnýskipan og stjórnarskipan vórðu viðgjørd. Eisini sóu vit stórslignan tónleikadokumentar um G! festivalin og sorgblíða søgu um gøtumannin Tummas Jákup Thomsen, hvørs harðbalna lív varð lýst í sendingini “Lívið fekk litir”. Saman við yngru hyggjarunum sóu vit norska jólakalendaran Snæfall, har ein rúgva av føroyskum børnum legði rødd til. Kúllarnir báðir Koba & Vatnhamar tóku okkum við á ferð at fáa innlit í eitt nú søguna handan føroyska seyðin. Lyst er nýggj aktuel sjónvarpssending um listina.

Nón er nýggj seinnapartsending í útvarpinum, sum av álvara hevur fingið jaligar afturmeldingar fyri at fara í dýpdina við nógvum evnum bæði av samfelagsligum og mentanarligum slag. Eisini í Nón eru vit við til at seta dagsskránna og elva til kjak um viðkomandi viðurskifti á upplýstum grundarlagi. Miðlakanningar okkara vísa, at ein rættiliga stórur partur av lurtarum okkara lýðir á frá morgunstundini, tá fryntligu morgunvertir okkara varpa ljós á ymiskt dagsaktuelt virksemi í sendingini Góðan morgun Føroyar.

Tvørmiðlavirksemi er ein av lyklunum til, at KVF skal eydnast við framhaldandi at vera ein týðandi mentanar- og tíðindaberi, tí skulu framleiðslufólk okkara megna at veita til allar miðlapallarnar. Í 2017 setti KVF í starv grafikara og ábyrgdarfólk fyri sosialu miðlarnar, sum eisini er ein ásannan av, at vit eisini mugu seta inn við starvsfólkatilfeingi við serfrøði á ymsu pallunum. Vit kunnu ikki góðtaka, at ungu miðlabrúkararnir ikki fáa ágóða av okkara dygdargóða tilfari, bara tí tey ikki brúka siðbundnu miðlarnar. Tí mugu vit støðugt menna okkum og okkara førleikar til at varpa út á øllum pallum og heysta ágóðarnar av styrktu samskiftismøguleikunum á nýggju pallunum.

Í 2018 gera vit íløgur í eitt nú at menna okkara førleikar og skipanir til at skapa góðan grafikk til at stuðla undir góðu søgurnar. Eisini uppstiga vit okkara framleiðslutól til at kunna gera dygdargóðar sjónvarpsupptøkur í hágóðsku video. Harumframt taka vit nýggjan framleiðslubygning í nýtslu. Lurtarar og hyggjarar fara at merkja ágóðan av íløgum í tól, tøkni og førleikar við enn betri sendingum og upplivingum.

Við ynskjum um enn eitt gott ár fyri KVF í fólksins tænastu.

**Johnny í Grótinum, kringvarpsstjóri**



## KVF framleiðslur í tímum

| Bólkar | Útvarp | Sjónvarp | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Aktuelt | 455 | 86 | 541 |
| Tónleikasendingar | 1683 | 76 | 1759 |
| Infotainment | 924 | 49 | 973 |
| Børn og ung | 85 | 128 | 213 |
| Átrúnaður | 193 | 74 | 267 |
| Mentan | 484 | 117 | 601 |
| Ítróttur | 136 | 106 | 242 |
| Samanlagt | 3960 | 636 | 4596 |

**BÓLKARNIR FEVNA UM HESAR SENDINGAR:**
Aktuelt: Útvarpstíðindi, Dagur og Vika, Radarin, D&V-kjak og mánakvølds reportagan.

Tónleika sendingar: Tónleikasendingar í útvarpi og sjónvarpi, FMA og aðrar konsertir.

Infotainment: Orðið er heitið fyri sendingar, sum fella undir “information” ella “entertainment”. Hesar sendingar eru undir bólkinum Infotainment: Morgunsendingin, GMF, sendingin Vikuskiftið, Nú er leygardagur, ólavsøkuprát, Gekkurin, summargestir o.tl.

Børn og ung: Barnaútvarpið og allar barna-sendingar í sjónvarpi, bæði føroyskar og týddar.

Átrúnaður: Morgunlestrar, andaktir, guðstænstur, møti og sendingin Credo.

Mentan: Mentanarsendingar, (Nón), siðsøga (Meg Minnist), samrøður, frásagnir (Við Tórða á túri o.l.), náttúrusendingar, dokumentarsendingar hóskvøld, framhaldssøgur, stuttsøgur, tónleikasendingar við samrøðum, ymsar sendingar um høgtíðir o.l.

Ítróttur: Ítróttasendingin í útvarpinum í vikuskift-unum, 3-2 í sjónvarpinum, frásagnir frá fótbólti og hondbólti, finalur í hondbólti, flogbólti, fót-bólti, svimjing, badminton, borðtennis og judo, landsdystir í fótbólti og onnur føroysk luttøka í altjóða kappingum.

Sendingar, sum falla uttan fyri bólkingina:

Tingvarpið í sjónvarpinum: 58 tímar.






# Álitisbarometrið

Álit er ein av fortreytunum fyri tilveruræ ttinum hjá Kringvarpi Føroya, og er hetta nakað sum stovnurin arbeiðir miðvíst við at varveita og betra. Fyri at fáa eina betri fatan av, hvat álit føroyingar hava á stovnin, og hvat teir yvirskipað halda um Kringvarp Føroya, verða regluligar kanningar gjørdar.

Síðan februar í 2016 hevur Spyr.fo regluliga kannað, hvussu tað stendur til við áliti føroyinga til Kringvarp Føroya og aðrar føroyskar miðlar.

Spurnarkanningarnar taka støði í 400 svargevum eldri enn 15 ár, umboðandi alt landið. Tílíkar spurnarkanningar skulu altíð takast við ávísum fyrivarni, tó kunnu afturvendandi spurnarkanningar sum hesar geva nakrar góðar ábendingar.

### Hvussu stórt álit hevur tú á hesum miðlum?



Álitsbarometrið gongur frá 1 upp til 7, sum er fult álit.
Álitið er kannað átta ferðir og 4,41 er hægsta meting. Í seinastu kanningini var barometrið 4,38.
Heildarmyndin vísir, at álitisbarometrið er hækkað støðugt.
Talvan niðanfyri vísir samlaða álitið á føroyskar miðlar í mun til álitið á Kringvarp Føroya.

## Álit á Føroyskar tíðindamiðlar samanborið við álit á KVF




Talvurnar niðanfyri vísa neyvari, hvussu álitistølini eru flokkað á stiganum frá 1 til 7.

## Álit á Føroyskar tíðindamiðlar generelt




## Álit á KVF sum tíðindamiðil






# Hendingaríkt ár

Aktuelt ger átta tíðindasendingar og ein samandrátt av týdningarmiklastu tíðindunum fimm dagar um vikuna og tríggjar tíðindasendingar hvønn leygardag og hvønn sunnudag. Radarin er ein tímalang perspektiverandi sending eina ferð um vikuna, sum fer í dýpdina við einum ella tveimum evnum, fýra sjónvarpstíðindasendingar eru við ymiskum sereykennum ymsu dagarnar. Mánadag er ein longri reportasja. Týsdag er kjak á skránni eftir Dag & Viku, og hósdag er ítróttur aftrat vanligu sjónvarpstíðindunum. Mentan hevur havt sítt fasta pláss fríggjakvøld, men flutti í 2017 í sína egnu sending, Lyst, eftir Dag & Viku.

Starvsfólk á Aktuelt arbeiða á fleiri plattformum. Útvarp, sjónvarp, heimasíðu og síðst men ikki minst, so eru sosialu netverkini blivin ein integreraður partur av okkara máta at røkka fólk í Føroyum við tíðindum og øðrum tilfari, sum KVF framleiðir.  Sosialu netverkini Facebook, Instagram og Snapchat eru fyrst og fremst eitt nýtt infrakervi fyri tíðindi og samskifti við brúkaran. Tó verður eisini sent beinleiðis á facebook av og á. Til dømis sendi Góðan morgun Føroyar beinleiðis á Facebook, umframt í útvarpinum, tá ársins granni varð kosin.



**REMBINGAR**
Árið 2017 var merkt av nógvum stórum politiskum nýskipanum innan fiskivinnuna, pensjón, av stórum rembingum á arbeiðsmarknaðinum og stórum rembingum á altjóða pallinum. Stórar rembingar, sum í ávísan mun hava sett stór faklig krøv til journalistikk.

**SKATTAMÁLIÐ II**
TAKS kom í februar í ár til niðurstøðuna, at Eik Banki ikki hevði rætt til tær 92 milliónir krónurnar, sum bankin upprunaliga fekk játtað sum frádrátt á sumri 2015. TAKS metti tó ikki, at málið skuldi







fáa avleiðingar fyri Eik Banka. Aktuelt gjørdi ein dokumentar um Skattamálið í 2016, og í 2017 gjørdi Aktuelt uppfylgjandi dokumentarin ”Skattamálið II”, ið elvdi til stórt samfelagsligt kjak, umframt kjak um leiklutin hjá KVF. Sendingin varð tilnevnd Aalund Erhvervsjournalistpris.

**TEMA: EIK SAKARMÁLIÐ, PENSJÓNSNÝSKIPANIN, SKIL FISKIN**

Størri søgur, sum hava stórt alment orðaskifti við sær og sum KVF dekkar yvir eitt longri tíðarskeið, kunnu verða torskildar. Hesar eru skipaðar sum Tema á kvf.fo. Í einstøkum førum hevur talan verið um sera torskilt politiskt/løgfrøðisligt mál, sum t.d. Fiskivinnunýskipanina. Fyri at røkka so nógv fólk sum gjørligt vóru smærri ”Skil fiskin” sendingar framleiddar til heimasíðuna og til útvarpið.

**MÁNADAGSREPORTASJAN**

Ein journalistiskur formur, sum sjáldan hevur verið at sæð í føroyskum sjónvarpi, er tann klassiska reportasjan, har tíð verður brúkt til at fylgja einum máli, ella einum persóni yvir eitt longri tíðarskeið. Við mánadagsreportasjuni er orka sett av til at royna hesa journalistisku sjangru. Reportasjan verður gjørd yvir eina viku av einum reportara og einum fotografi og send mánakvøld í Degi &Viku. Reportasjan er samstundis ein roynd at røkka longri út runt landið, enn áður.

**TRÍGGJAR ÚTVARPSSENDINGAR ÚR KATALONIA**

Spanski landsluturin Katalonia stendur, og spanskur samleiki er á einum vegamóti. Sunnudagin 1. oktober var fólkaatkvøða um samband við ella

*Framhald á næstu síðu...*

loysing frá restini av Spania. Spanska løgreglan legði uppí, og spanski grundlógardómstólurin dømdi fólkaatkvøðuna at vera í stríð við sponsku grundlógina.

Aktuelt vitjaði spanska landslutin, sum Atlantsflog flýgur beinleiðis til. Tríggjar útvarpssendingar vórðu gjørdar um katalanska stríðið, umframt at nógv tíðindainnsløg vórðu gjørd um fólkaatkvøðuna og valið seinni í 2017.









**MORÐ I ÍSLANDI**
Tað vakti ans um allan heimin, tá íslendska Birna Brjánsdóttir hvarv, og tveir mans umborð á trolaranum Polar Nanoq vóru undir illgruna. Manningin umborð á skipinum var partvís føroysk, og tí vakti málið serligan ans her heima. Kringvarpið dekkaði málið úr Íslandi teir fyrstu dramatisku dagarnar og fylgdi revsirættarmálinum líka til dómur var avsagdur.

Ein samrøða við Niels Jacob Heinesen, sum var við Polar Nanoq hendan túrin, var best umtókta innslagið á kvf.fo í 2017.

**STRÍÐ Á FØÐIDEILDINI**
Eitt fakligt kjak millum fakbólkarnar á føðideildini á Landssjúkrahúsinum, hevði við sær hópin av sjúkrameldingum og undantaksstøðu á deildini. KVF fylgdi málinum á øllum platformum. Dekningurin elvdi til kjak og til eina kæru frá leiðsluni á Landssjúkrahúsinum til fjølmiðlakærunevndina. Leiðslan metti at KVF gjørdi ov nógv av í einari yvirskrift, har spurnartekin varð sett við trygdina á deildini. Kærarin fekk partvíst viðhald. KVF almannakunngjørdi allan úrskurðin hjá fjølmiðlakærunevndini á kvf.fo og nevndi niðurstøðuna í útvarpinum og í Degi & Viku.

**VARÐIN BRANN**
Fríggjamorgunin 9. juni kyknaði eldur í stóra uppsjóvarvirkinum Varðin Pelagic á Tvøroyri. Støðan var sersøk, tí partur av íbúgvunum í býnum mátti burturflytast. Tað eydnaðist okkum við hjálp frá bjargingarbátinum Lív at vera í Trongisvágsfirði við tendraðum myndatólum og beinleiðis myndum og frásagnum á kvf.fo stutt eftir. Bráfeingis tíðindasendingar vóru í útvarpinum hvønn tíma og myndir og ávaringar frá myndugleikum til fólk í Suðuroy fóru út til fólk á Facebook og í útvarpinum.

Kringvarpið er partur av tilbúgvingini.

**VERKFALL/VERKBANN**
Verkfall og verkbann vóru á føroyska arbeiðsmarknaðinum í 2017. Felagið føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar sendi limir sínar í verkfall í 17 dagar, meðan Føroya Pedagogfelag varð rakt av verkbanni við ársenda. Verkbannið helt fram í 2018. KVF dekkaði báðar arbeiðssteðgirnar so objektivt, sum til ber. Avbjóðingin hjá journalistikki í arbeiðsósemjum er ikki at lata seg brúka av pørtunum til at leggja trýst á hvønn annan. Hetta





eydnaðist væl, hóast trýstið á redaksjónirnar frá bæði arbeiðsgevarum og fakfeløgum stundum var stórt. Tað er umráðandi, at tíðindafólk ikki eru í parti við nøkrum í einari arbeiðsósemju, men fyrihalda seg so objektivt sum til ber til krøv, gerðir og pástandir.

Verkfallið hjá Pedagogfelagnum ávirkaði eisini gerandisdagin á Aktuelt. Fleiri starvsfólk hava børn á ánsingarstovnum, sum vórðu raktir av verkbanninum.

**KJAKSENDINGAR**
Tá Fiskivinnunýskipanin var til 3. viðgerð í løgtinginum, skipaði KVF fyri einari tímalangari beinleiðis kjaksending úr Løgtinginum.

KVF skipaði eisini fyri fleiri almennum kjakfundum í 2017. Millum annað var alment orðaskifti á Torradøgunum um fiskivinnunýskipanina. Kjakið varð sent beinleiðis í útvarpinum og stroymt á heimasíðuni (sjónvarp).

**STROYMA**
Alsamt fleiri hendingar og tiltøk verða stroymd á kvf.fo. Í 2017 varð stroymt, tá ið fyrsta skotið varð latið av til Eysturoyartunnilin. Stroymt varð eisini, tá ið játtanarkarmurin fyri 2018 var lagdur fram alment í Fíggjarmálaráðnum og frá almennum kjakfundi, sum KVF skipaði fyri í samstarvi við Klaksvíkar kommunu á Torradøgunum.

**TÍÐINDI Á ENSKUM**
Samsvarandi Public Service sáttmálanum, varð farið undir tilgongdina at gera tíðindi á enskum til útlendingar, búsitandi í Føroyum, sum ikki duga føroyska málið. Hetta arbeiðið var sett í verk í 2017 (og er farið av bakkastokki í 2018). Føroysk tíðindi á enskum síggjast á heimasíðuni kvf.fo. Móttøkan hevur verið sera jalig millum útlendingar í Føroyum, sum siga seg vera betur før fyri at fylgja við og luttaka í samfelagnum á jøvnum føti við onnur.

**SJÓNVARP**
Hvørja viku í vetrarskránni sendir KVF føroyskar dokumentarar í sjónvarpinum. Sendingarnar varpa ljós á tættir í føroyska samfelagnum og kunna hyggjaran um viðurskifti, sum hava breiðan samfelagsligan áhuga.

Á vári í 2017 sendi KVF stuttrøðina “Fisk og skips”, ið fylgdi fiskinum - frá tí hann varð fiskaður og hagreiddur - hagar, ið hann varð tilgjørdur og borðreiddur á vælumtóktum matstovum. Tær tríggjar sendingarnar góvu sostatt á ein upplýsandi og undirhaldandi hátt innlit í, hvussu føroyska útflutningsvøran endaði á døgurðaborðunum í San Sebastian, New York og Moskva.

Ferðavinnan veksur alsamt, og sendingin “Ferðafólkini koma” setti sjóneykuna á, hvussu ótálmaði ferðafólkavøksturin í Mykinesi setir náttúruna undir trýst og gevur bygdarfólkunum alsamt vaksandi avbjóðingar.

Kringvarpið vísti eisini fleiri dokumentarar, sum viðgjørdu heilsustøðuna hjá føroyingum. “Vit eru enn til” lýsti støðuna hjá alzheimer-sjúklingum, og “Eitt dýpi av máttloysi” gav innlit í eina av stóru fólkasjúkunum, nevnliga strongd. Økt krøv á arbeiðsplássinum og í familjulívinum fáa alsamt fleiri at leita sær hjálp fyri strongd. Í Føroyum stríðast vit eisini við serliga nógvar genetiskar sjúkur. Sjúkur, sum eru deyðiligar og ólekjandi. Sendingin “Tær sjey plágurnar” reisti spurningin, hví ið politiski myndugleikin ikki ger meira fyri at fyribyrgja, at børn verða fødd við hesum sjúkunum.

KVF leggur eisini dent á, at nakrar sendingar hava varandi virði fyri eftirtíðina og kunnu brúkast eitt nú av skúlaverkinum. Í røðini “Kendir føroyingar” hoyrdu vit um lívið hjá Hans Jákup Højgaard, Ebbu Hentze, Niels Juel Arge og Kjølbro.

Ein av mest umrøddu sendingunum í 2017 var “Ást fjalir lýti”, sum var um morðið á eina norska gentu í Havn í 1967. Hetta var fyrsta morðið í Havn í nærum 300 ár, og hendingin varð í stóran mun tagd burtur.

Kringvarpið velur eisini at fylgja ymsum langtíðarætlanum. Eina av hesum kundu hyggjararnir síggja í sendingini “Rekamaðurin á Hellunum”, har eini hús á Hellunum vórðu bygd upp frá grundini við rekaviði. Sendingin gav innlit í bæði handverk, byggimentan og menniskjaligt áhaldni.

**LIST**
Kringvarp Føroya hevur javnan sjónvarpssendingar á skránni, sum viðgera føroyska list.












Mentanarsendingin Grindin varð send regluliga fyrra hálvár í 2017. Í sendingini “Tann djúpa røddin” vitjaði KVF operasangaran Rúna Brattaberg í Leipzig í sambandi við, at hann hevði fingið Mentanarvirðisløn Landsins. “Lívið hevur fingið litir” lýsti stríðið hjá listamanninum Tummas Jákup Thomsen at koma ígjøgnum sínar rúsdrekkatrupulleikarnar. Sendingin “Millum himmal og helviti” var um G-festivalin, hvussu alt byrjaði og um hvussu ung, tónleikarar og bygdarfólk upplivdu hetta stóra tónleikatiltakið á Gøtusandi.



**UNDIRHALD**
Undirhald hevur øll árini verið ein týðandi partur av senda tilfarinum í KVF. Undirhald er ofta fastur táttur í ymsum sendingum, men KVF hevur javnan sent undirhaldsrøðir, sum bera brá av infotainment – sum er ein blandingur av undirhaldi og kunning til hyggjarar og lurtarar. Ítróttarspurnarkappingin “Í Drátti”,  har kend ítróttarfólk frá ymsum ítróttargreinum kappaðust móti hvørjum øðrum, varð send í sjónvarpinum á vári í 2017. Á heysti sendi sjónvarpið røðina “Koba & Vatnhamar II ”, har teir báðir Finnur Koba og Tróndur Vatnhamar hildu fram við at kunna og undirhalda um mangt og hvat á mentanarliga økinum.

---

**ÚTVARP**
Í 2017 vóru tvær nýggjar mentanarsendingar á skránni í útvarpinum:

**NÚ ER LEYGARDAGUR**
Á heysti 2017, fór Kringvarpið undir nýggja sending leygardag.

Nú er leygardagur er sending leygardag frá 10-14, og hon er fyri alla familjuna, og hetta endurspeglast til dømis í tónleikinum, ið er væl blandaður. Vit leggja okkum eftir at hava lætt útvarp, har møguleiki er hjá lurtarum at vera við í stóran mun. Bæði við Also, við kappingum og við møguleikanum at senda inn sína hugsan um dagsins evni við sms-boðum.

Evnini í sendingini spenna víða, men hava tað til felags, at lurtarin fær møguleika at læra okkurt. Antin at fáa vitan um evni, ið ikki verða viðgjørd aðrastaðni, ella sum íblástur til at fara undir eitthvørt sjálv/ur. Eisini tekur sendingin pulsin av tí, sum fyriferst kring landið.

**NÓN**
Nón er nýggj sending, sum er komin á skránna seinnapartar í útvarpinum.

Nón er sjálv løtan á degnum um trítíðina seinnapart, og sent verður týsdag, mikudag og hósdag, tveir tímar hvørja ferð, frá klokkan 3 til 5. Nón er magasinsending, og karmurin er mentan og samfelag. Málið er at venda aftur til klassiskar útvarpsdygdir, har málið er at geva lurtaranum upplýsing, uppliving og undirhald.

Týsdagurin hevur verið kallaður tematýsdagur, har farið verður í dýpdina við einum ávísum evni. Mikudagur er settur av til mentan, og hósdagur er oftast í aktuella horninum. Nón er beinleiðis útvarp, kryddað við reportasjum, frásagnum og kjaki, og stundir verða givnar til longri viðgerðir og samrøður um ymisk evni.

Ítróttarsendingin 3-2 er í sjónvarpinum mánakvøld, ítróttur er eisini partur av sjónvarpstíðindunum hóskvøld. Sparta varð send í útvarpinum fram til 1.juni, men varð síðani tikin av skránni. Fótbóltssendingin, Bólturin, er í útvarpinum sunnudag. KVF framleiddi/sendi steypafinalurnar í hond- flog- og fótbólti, FM í svimjing, FM í borðtennis, badminton og judo og FM í fimleiki. KVF sendi seks undandystir hjá fótbóltslandsliðnum. Sent varð frá øllum sjey FM-kappróðrunum, bæði í útvarpi og live-stream á heimasíðuni. Kringvarpið stroymir nógvan ítrótt. Í 2017 stroymdi KVF frá fótbólti, hondbólti, flogbólti, kurvabólti, kappróðri og dart.

Og seinast í desember sendi KVF "Árið ið fór" í ítrótti í sjónvarpinum.




**STØRRI ÍTRÓTTARFRAMLEIÐSLUR Í 2017**

| | |
|---|---|
| 08.01.2017 | U21 HM undankappingardystur í Hondbólti: Føroyar - Finnland (sjónvarp) |
| 18.02.2017 | Steypafinalurnar í hondbólti (sjónvarp) |
| 25.02.2017 | Steypafinalurnar í flogbólti (sjónvarp) |
| 24.03.2017 | FM í svimjing - beinleiðis (sjónvarp) |
| 25.03.2017 | HM undankappingardystur í fótbólti: Andorra-Føroyar |
| 25.03.2017 | FM í svimjing dagur 1 (sjónvarp) |
| 26.03.2017 | FM í svimjing dagur 2 (sjónvarp) |
| 08.04.2017 | HM undankappingardystur hjá kvinnum í fótbólti: Føroyar - Montenegro (sjónvarp) |
| 11.04.2017 | HM undankappingardystur í fótbólti hjá kvinnum: Føroyar - Turkaland (sjónvarp) |
| 22.04.2017 | Stóri FM-dagurin í badminton, borðtennis og judo (sjónvarp) |
| 13.05.2017 | FM í estetiskum fimleiki (sjónvarp) |
| 27.05.2017 | Kappróður - beinleiðis (sjónvarp og útvarp) |
| 09.06.2017 | HM undankappingardystur í fótbólti: Føroyar - Sveis (sjónvarp) |
| 24.06.2017 | FM kappróður í Tvøroyri - beinleiðis (sjónvarp og útvarp) |
| 27.06.2017 | Oyggjaleikir 2017 - úr Gotlandi (sjónvarp og útvarp) |
| 28.06.2017 | FM kappróður í Hósvík - (sjónvarp og útvarp) |
| 30.06.2017 | Oyggjaleikir 2017 - úr Gotlandi (sjónvarp og útvarp) |
| 01.07.2017 | Oyggjaleikir 2017 - úr Gotlandi (sjónvarp og útvarp) |
| 01.07.2017 | FM kappróður í Fuglafirði - beinleiðis (sjónvarp og útvarp) |
| 08.07.2017 | FM kappróður á Skála/Strondum (sjónvarp og útvarp) |
| 15.07.2017 | FM kappróður í Miðvági (sjónvarp og útvarp) |
| 28.07.2017 | FM kappróður í Havn (sjónvarp og útvarp) |
| 26.08.2017 | Finalan um Løgmanssteypið (sjónvarp og útvarp) |
| 31.08.2017 | U21 EM undankappingardystur í Fótbólti: Føroyar-Danmark (sjónvarp) |
| 31.08.2017 | HM undankappingardystur í fótbólti: Portugal - Føroyar (sjónvarp og útvarp) |
| 03.09.2017 | HM undankappingardystur í fótbólti: Føroyar - Andorra (sjónvarp og útvarp) |
| 09.09.2017 | Kvinnufinalan í fótbólti 2017 (sjónvarp) |
| 01.10.2017 | EM undankappingardystur í hondbólti: Føroyar - Svøríki (sjónvarp) |
| 07.10.2017 | HM undankappingardystur í fótbólti: Føroyar - Lettland (sjónvarp og útvarp) |
| 10.10.2017 | HM undankappingardystur í fótbólti: Ungarn - Føroyar (sjónvarp og útvarp) |
| 22.10.2017 | Norðurevropiski meistaraskapurin í amboðsfimleiki (sjónvarp) |
| 22.10.2017 | Norðurevropiski meistaraskapurin í amboðsfimleiki (sjónvarp) |
| 03.11.2017 | FM í svimjing dagur 1 (sjónvarp) |
| 04.11.2017 | FM í svimjing dagur 2 (sjónvarp) |
| 05.11.2017 | FM í svimjing dagur 3 (sjónvarp) |
| 10.11.2017 | U21 EM undankappingardystur í Fótbólti: Føroyar - Pólland (sjónvarp) |





# 500 ár síðani trúbótina

2017 var árið, tá 500 ár vóru liðin, síðani Martin Luther og trúbótina. Hesin søguligu veruleiki hevur verið ein reyður tráður í sangupptøkum, sendingum og prædikum.

Útvarpið hevur sent morgunlestrar 6 dagar um vikuna og guðstænastu ella møti hvønn sunnu- og halgidag. Hetta heilaga evangeliið skrivar er hvønn leygardag, og sendingin Credo, sum varpar ljós á átrúnað og onnur menniskjanslig viðurskifti og rák er sunnumorgun. Í sjónvarpinum hjá Kringvarpinum er guðstænasta ella møti hvønn sunnudag og halgidag annars, og sunnukvøld er andakt á skránni.

**GUÐSTÆNASTUR OG MØTI Í ÚTVARPINUM**
Vit hava tikið upp og sent guðstænastur og møti hvønn sunnudag runt landið, har tað hevur borið til. Harumframt hava vit sent frá nøkrum serstøkum guðstænastum. Her kunnu nevnast:

- Uttanduraguðstænasta av Ovara vølli í Havn
- Dansibandguðstænasta úr Vági
- Tónleikaguðstænasta úr Mentanarhúsinum á Eiði
- Fagnaðarguðstænasta – Trúbótin 500 ár úr Dómkirkjuni í Havn

Seks ferðir um árið senda vit evangeliskt møti hjá Brøðrasamkomuni.

Á heysti útvarpaðu vit Samfelagsmøtið hjá Brøðrasamkomuni á Nabb.

**GUÐSTÆNASTUR OG MØTI Í SJÓNVARPINUM**
Nýggjársaftan og nýggjársdag sendu vit nýggjársguðstænastu, sum varð tikin upp í Gøtu Kirkju. Vit hava sent felagskirkjuliga guðstænastu, sum í ár var í Vesturkirkjuni.

Vit hava sent møti av Brimli og "grøna guðstænastu" úr Glyvra kirkju.

Ein guðstænasta var í Gjónni við Gjógv. Guðstænastur og møti annars verða send ymsastaðni frá í landinum.

Tá søkur og stevnur eru, royna vit at senda guðstænastur haðani.

Møti og guðstænastur annars eru úr Katólsku Mariukirkjuni, Hvítusunnusamkomuni, Kelduni, Oasuni, Adventistakirkjuni, Kirkjuliga heimamissiónsfelagnum, Brøðrasamkomuni, Frelsunarherinum  Heimamissiónini.

# Barnaútvarpið







**FERÐAST KRING LANDIÐ**
Vit byrjaðu árið við at ferðast kring landið at tosa við børn, eitt nú vóru vit á Húsum og í Mikladali og tosaðu um at búgva á bygd, um Kópakonuna og annað viðkomandi. Hesa tíðina á árinum hoyra vit ævintýr, sagnir og kvæði, soleiðis at vit fylgja mentan og siðaarvi, sum hóskar til árstíðina.

**LOYNDARMÁLIÐ Í VENEZIA**
Hálvan januar bjóðaðu vit børnunum útvarpsleikin Loyndarmálið í Venezia, sum var ein spennandi detektivsøga í átta pørtum.

**60 ÁRA FØÐINGARDAGUR**
Tann 6. februar hevði Barnaútvarpið 60 ára føðingardag, og hetta valdu vit at hátíðarhalda við at gera eina evnisviku um føðingardagsbarnið. Vit valdu at reypa av okkara fjøltáttaða, virðismikla savni og bjóðaðu børnum, ungum, vaksnum og søgufrøðingi í útvarpsstovuna at greiða frá, hvat tey mintust best frá Barnaútvarpinum gjøgnum tíðirnar. Eisini valdu vit at senda klassikarar gjøgnum árið 2017. Eitt nú leikirnir - Dýrini í Valbakkaskóginum, Oliver Twist, Anna Frank, Herviligi Henry, Kring jørðina í kavbáti.

**TVÆR MÓRUGØTUR**
Vit valdu at forkela alt Føroya fólk í samband við 60 ára haldið og bíløgdu tvær Mórugøtur frá Jákupi Veyhe. Hesar báðar vikurnar vóru sum altíð væl umtóktar bæði millum yngri og eldri, og kanska lærdu børnini nøkur nýggj orð um seyð og seyðahald.

**HVØR ERI EG?**
Tá ið Barnaútvarpið byrjar vetrarskránna í september, byrja vit altíð við áhugaverdum evni. Vit leggja dent á at gera evnisvikur, sum eru væl viðgjørdar, og sum øll kunnu identifisera seg við. Hesa ferð var evnið - Hvør eri eg? Vit prátaðu við sálarfrøðingar, lívfrøðing, filosoff, fólkalívsfrøðing og psykiatara. Vit vildu finna útav, hví vit eru, sum vit eru og hví vit eru so ymisk.

**LOVA MÆR VIÐ**
Vælkendi tátturin Lova mær við, tá ið børnini senda brøv og bjóða okkum til eitthvørt, var eisini partur av skránni 2017. Tað er sera áhugavert og stuttligt at ferðast kring landið og hoyra søgur frá børnum. Vit halda, at tað er sera týdningarmikið at børnini merkja, at tey hava ávirkan, og at tey mynda okkara sendingar.

**KEPLER62**
Bøkurnar um telduspælið Kepler62 eru spildurnýggjar. Fyrstu bókina í røðini valdu vit at gera til útvarpsleik í seks pørtum. Hesin leikur var eisini sera væl móttikin, tí hann var væl gjørdur við upplestri, leikarum og nýskrivaðum tónleiki.

**SØGAN UM SANGIN**
Áleið einaferð um árið hoyra vit søguna um sangin. Í 2017 hoyrdu vit søguna um hesar sangir: Tú alfagra land mítt, Syngja sama lag, Sunnukvøld í mai, Føðingardagsbamsan og Grækaris Grashøvd. Endamálið er tónleikur, sangur og søga í einum.

**BLANDAÐ BOMM**
Vit royna at blanda vikurnar so nógv sum gjørligt. Vit hoyra fiktión, nýtt tilfar, siðsøguligt tilfar og eru á staðnum, tá ið tiltøk eru.

**JÓLAKALENDARIN 2017**
Fyri at gera ein nýggjan jólakalendara til 2018, so valdu vit at endursenda - Stjørnan, ið hvarv frá 2002. Elin á Rógvi byrjaði í november at skriva nýggjan jólakalendara, sum er ein stór framleiðsla og eitt flott úrslit, sum vit senda í desember 2018.

# Barnasjónvarpið










**MORSA**
Vit sendu tvey umfør av Morsa. Hendan framleiðslan snýr seg um fiktión og læring. Vælkenda røðin um Katie Morag frá BBC er við. Verturin ger eitthvørt spennandi hvørja ferð og vit sóu, hvussu Elisabeth flættaði hár hjá gentum. Í 2.røð, sum byrjaði í september var nýggjur táttur við. Tað var kokkurin Janus Einar, sum gjørdi mat. Vit hava fingið góðar afturmeldingar frá børnunum um Morsa.

**LETIBYGD**
Vit løgdu til merkis, at børn hugdu eftir Lazy Town á Netflix, og valdu tí at endurnýggja rættindi og endursenda røðina, sum var framleidd í 2009. Vit hava eisini fingið jaligar viðmerkingar um hesa røð.

**Í DREYMAGARÐI**
Sum nakað nýtt, hava vit víðkað senditíðina og byrja nú hvørt kvøld klokkan 18.00. Soleiðis at eitt nú mánakvøld er til tey allarminstu, og har hava vit sent virðisløntu barnarøðina frá BBC - Í Dreymagarði. Síðani endursenda vit frá kvøldinum fyri.

**SNIPP-SNAPP**
Vit eru sera hørm um ikki at senda nýtt tilfar í Snipp-Snapp í 2017. Orsøkin er, at vit hava ov nógv at gera. Vit manglaðu at bíleggja nýggja røð og stundir til at týða og framleiða. Vit valdu tó at gera nýggjar sendingar, og vóru eitt nú á Sandoynni og tóku upp í vøkru náttúruni, har børn í Sands skúla vóru vertir.

**ALT UM DJÓR**
Hvørt týskvøld eru djórasendingar við føroyskari talu. Hesa røð eru børn sera fegin um. Tær eru krevjandi at framleiða og týða, men vit eru errin at senda góða úrslitið hvørt týskvøld. Vit velja at halda fast við hetta tilfar og bíleggja fleiri røðir frá BBC.

**SNÆFALL**
Størsta framleiðsla á barnaøkinum 2017 var jólakalendarin - Snæfall. Tað var serstakliga stuttligt, at Kringvarpið sendi sama jólakalendara sum DR í 2017, og børnini lærdu søguna at kenna allarfyrst á føroyskum máli. Hetta var ein stórfingin framleiðsla við nógvum leikarum, børnum og vaksnum. Her var tónleikur og sangur og vit valdu at gera nógv burturúr at reklamera fyri jólakalendaranum á øllum miðlum. Vit fingu nógvar jaligar afturmeldingar frá bæði børnum og vaksnum, tey vóru hørm um, at vit noyddust at taka hann av heimasíðuni seinast í januar 2018, tí vit ikki høvdu loyvi at hava hann liggjandi longur enn ein mánað. Søgan var so ómetaliga vælgjørd og væl framleidd.

**HEIMASÍÐAN**
Á heimasíðuni liggja sendingarnar, sum vit senda. Vit gjørdu tó eitt sindur meira burturúr sendingini Morsa við at leggja uppskriftir og flættur fyri seg. Eisini fóru vit afturum jólakalendaran - Snæfall og høvdu samrøður og myndir við leikarunum í jólakalendaranum.



# Røddin hjá teimum ungu

Røddin sá dagsins ljós í 2013. Røddin er tilboðið hjá Kringvarpi Føroya til tey ungu. Yvirskipaða ætlanin við Røddini er at fáa fatur á teimum ungu og venja tey at brúka miðlar og vera við til at skapa miðlaarbeiði. Røddin er ein heimasíða, sum er knýtt at kvf.fo. Tað eru ung fólk ið skriva, gera videoklipp og sjálvi redigera tilfarið á heimasíðuni. Tó er altíð eitt redaksjonelt starvsfólk hjá kringvarpinum knýtt at Røddini sum vegleiðari. Við hesum møguleikanum fáa ungir føroyingar høvi at royna síni skapandi evni at skriva um ung fyri ungum. Tað veri seg tíðindagreinar, hugleiðingar, yrkingar, stuttsøgur og annars at royna seg við videotólum.





# Tónleikur í Kringvarpi Føroya

Kringvarpið leggur seg eftir at spæla nógvan føroyskan tónleik. Í 2017 spældi útvarpið umleið 90.000 sangir, og umleið 45% av hesum vóru føroyskir.

Kringvarpið hevur ein tónleikasamskipara, sum samskipar alt tónleikaøkið í Kringvarpinum. Hesin skal m.a. tryggja, at Kringvarpið hevur ein fjølbroyttan og virknan tónleikapolitikk. Harumframt hevur Kringvarpið eitt Tónleikaráð, sum er mannað av Rúna Jákupsson, Elini Michelsen, Ragnari A. Jacobsen, Høgna Fagraberg, Rannvá Gaard Fossaberg, Una L. Hansen og Eyðfinni Jensen. Á vikuligum fundum í Tónleikaráðnum verður nýggjur tónleikur umrøddur, áðrenn hann verður settur í umferð í útvarpinum.

**TÓNLEIKASENDINGARNAR, Í VIKULIGU SKRÁNNI HJÁ ÚTVARPINUM, HAVA FEVNT BREITT UM FLEIRI YMISKAR SJANGRUR Í 2017**

- Afturljóð - popminnir frá 50', 60' og 70'unum
- Áðrenn Elvis - upprunatónleikur frá tíðini fyri Elvis og rock'n roll
- Bolero - klassiskur tónleikur Chorus - kórsangur og vokal tónleikur
- Døgurðabitin - blandaður tónleikur við skiftandi vertum
- Gospeltónar - kristin tónleikur
- Harmonikuløtan - útlendskur og føroyskur harmonikutónleikur
- Jazzofonin - jazztónleikur við skiftandi vertur
- Klassiskt sunnukvøld
- Kvørnin - ummæli av føroyskum tónleiki
- Norðurljóð - norðurlendskur (og føroyskur) tónleikur
- Plátubarrin - beinleiðis leygarkvøldssending við "temaplátu" og lurtaraynskjum Temaplátan - skiftandi útgávur verða viðgjørdar
- Tindar - nútímans popptónleikur frá heimsins hittlistum
- Tit skriva vit spæla - sending við lurtaraynskjum.
- Upp á gólv - føroysk kvæði
- Upp á tá - norðurlendskur og føroyskur dansebandstónleikur.




Umframt tær vikuligu sendingarnar, vórðu eisini aðrar stakar tónleikasendingar í útvarpnum og sjónvarpinum í samband við høgtíðir, merkisdagar og Spæl føroyskt vikuna. Spæl føroyskt vikan varð í útvarpinum frá 7. til og við 13. mars. Í hesum tíðarskeiðnum varð einans føroyskur tónleikur spældur í øllum nýggjum sendingum og rundan um sendingar annars. Skipað varð fyri Faroese Music Awards á fjórða sinni tann 10. mars í Norðurlandahúsinum, og KVF varpaði tiltakið beinleiðis bæði í útvarpinum og í sjónvarpinum.

**AÐRAR KONSERTSUPPTØKUR Í SJÓNVARPINUM:**

- Nýggjárskonsertin 2017, Føroya Symfoniorkestur
- Útgávukonsert, Jens Marni Hansen
- Útgávukonsert, Guðrið Hansdóttir Konsert í St. Magnuskirkjuni í Kirkwall – Niels Midjord
- Fagnaðarkonsert við Føroya symfoniorkestri
- Jólaklokkan ringir aftur – jólakonsert úr Rituvíkar kirkju
- Jól við Løkin
- Tórshavnar Big Band – Minnist tú enn

**AÐRAR KONSERTUPPTØKUR Í ÚTVARPINUM:**

- Händels Messias 1 .& 2. partur– Upptøka í Vesturkirkjuni, Ólavur Hátún stjórnar Kórstevnan 2017 (NLH)
- Musikkstevnan 2017 (Sørvági)
- Tórshavnar Manskór og Eystanljóð
- Jólakonsert við Føroya symfoniorkestri



# Bjargingin væl ávegis





SavnsGull er verkætlanin, sum skal bjarga tilfarinum í Savninum, og verkætlanin skal eisini gera tilfarið atkomuligt fyri almenningin. Tilfarið er goymt í savninum hjá Kringvarpi Føroya.

SavnsGull leggur seg eftir, at góðskan á talgilda tilfarinum er so góð sum gjørligt, og tí er “góðska” eisini eitt høvuðshugtak í arbeiðinum.

Savnið er sundurbýtt í tríggjar eindir: pappír, útvarp og sjónvarp.

Hesar eindir skulu talgildast, og verða skrásettar, so tað gerst møguligt hjá øllum føroyingum at leita í savninum, har tey eru stødd.

Pappírseindin av savninum verður talgildað í Kringvarpshúsinum. Pappírsskjølini eru goymd í mappum og sett í goymsluna. Hvørt ark verður skannað inn og síðani viðgjørt í forriti, sum er evnað til endamálið. Forritið er gjørt av dugnaligum fólki í KT deildini í Kringvarpium. Teksturin verður rættaður og skjalið síðani skrásett. Rættingin fevnir í høvuðsheitum um at rætta tey møguligu lyklaorðini, sum kunnu standa skeivt stavað - ella annað - soleiðis, at tað seinni verður møguligt at finna skjølini aftur, tá leitað verður eftir tí einstaka orðinum, setningi ella navni v.m. Arbeiðið gongur væl framá, og umleið helvtin av øllum pappírtíðindunum eru nú skrásett.

Fyri 2001 vórðu allar sendingar, og alt annað, sum varð upptikið og sent í Útvarpi Føroya, tikið upp á bond, sum eru varðveitt og sett á goymslu. Savnið fevnir um 26.846 bond. Bondini verða tikin út savninum og talgildað. Eskjurnar, bondini liggja í, eru merktar við merkiseðli, sum verður skannaður og skrásettur. Arbeiðið gongur so mikið væl, at tað er komið longri enn væntað.

SavnsGull hevur nú eisini átikið sær at talgilda bondini í bandasavninum hjá Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya

Talgildingin av sjónvarpsbondum er nakað øðrvísi enn ljóðbóndini, tá tey eru í ymiskum formi. Nøkur bond verða talgildað her heima, meðan onnur verða send uttanlands. Bondini verða send til belgiska fyritøku at verða talgildað, tí útgerðin finst ikki í Føroyum, og er annars ring - og dýr - at fáa til vega. Tí vórðu umsóknir sendar út, og í 2016 fekk SavnsGull játtað 5 mill. kr. Frá A. P. Møller og Hustru Chastine Mc-Kinney Møllers fond til almene Formaal.

Arbeiðið, at savnið verður atkomuligt fyri Føroya fólki, er farið í gongd, har Facebook og kvf.fo hevur verið brúkt. SavnsGull hevur eisini verið úti um landið, har vit eitt nú hava verið á miðnámsskúlum saman við Tjóðsavninum, Føroya Landsbókasavni, Landsskjalasavninum og Fróðskaparsetrinum. Greitt varð frá, hvussu tey fáa ágóðan av okkara talgildu søgu. Í næstum fer rættilig ferð at koma á arbeiðið, at Føroya fólk fær atgongd til tilfarið í savninum.

Samanumtikið má sigast, at arbeiðið við at bjarga savninum hjá Kringvarpi Føroya gongur væl. Hugsað verður um, at góðskan er so góð sum gjørligt, soleiðis, at savnið framvegis verður varðveitt so væl sum til ber, og at tað verður øllum føroyingum til gagns framyvir.




# KVF á sosialu miðlunum

Kringvarpið fekk í 2017 boð frá 225 borgarum á Facebook. Borgarar venda sær til Kringvarpið við øllum frá tekniskum trupulleikum, spurningum, rísi og rósi. Øll boð verða lisin og eru ítøkiligir spurningar, verða hesir svaraðir, so væl sum gjørligt av umsitara. Annars verða spurningar sendir rætta viðkomandi í Kringvarpinum, so hesin kann hjálpa borgararnum. Hetta kann eitt nú vera, um borgarin vil hava greiðu á redaktionellum avgerðum ella líknandi.

**BOÐINI SNÚGVA SEG SERLIGA UM**

- Tekniskar trupulleikar
- Sendingar á heimasíðuni
- Skránna
- Um møguleika at keypa sendingar
- Tíðindaflutningin
- Rættindi at vísa ymiskt tilfar á netinum

Í serstøkum førum, sum til dømis tá illveður er, fær Kringvarpið eftir áheitan nógv boð við myndum og filmsbrotum, sum síðani verða brúkt á pallum Kringvarpsins. Miðað verður eftir at svara øllum beinleiðis spurningum, sum koma á Facebook-vangan hjá Kringvarpinum. Í miðal er svartíðin nakrar fáar tímar, tó er longri svartíð um vikuskiftið og halgidagar. Hetta ger Kringvarpið vart við, so skjótt eini boð verða móttikin í boðklivanum hjá Kringvarpinum á Facebook.

Kringvarpið vil koma nærri brúkarunum. Við teimum sosialu miðlunum stremba vit eftir at skapa meirvirði fyri Kringvarpið sum stovn og fyri sendingar kringvarpsins. Kringvarpið vil brúka sosialu miðlarnar at røkka brúkarunum á teirra premissum, soleiðis at vit eitt nú undirhalda og upplýsa tey, ið kanska ikki eru at rokna sum lurtarar og/ella hyggjarar.

Kringvarpið brúkar sosialu miðlarnar til at veita upplýsing um tilfar okkara. Tað verði seg brellbitar, tíðindi, skrábroytingar, kunning o.a. Til tíðir sendir Kringvarpið beinleiðis frá sosialu miðlunum, um okkurt serstakt hendir. Eitt nú tá morgunsendingin leitar eftir ársins granna/ársins starvsfelaga.

Í serligum førum, sum til dømis tá illveður er, brúkar Kringvarpið Facebook at røkka brúkarum, men eisini at samskifta við brúkaran um ymiskt. Mangan veita brúkarar myndir og filmsbrot av til dømis illveðrinum osv.

Kringvarpið á Facebook veitir borgarum og brúkarum tíðindi, brellbitar og undirhald. Á vangunum er møguleiki at vísa brúkarunum ta dimensiónina, sum brúkarar ikki fáa við eitt nú at hyggja ella lurta eftir Kringvarpinum.

Visiónin er at ganga á odda, tá tað kemur til talgildar miðlar. Men týdningarmiklast er endamálið við talgildu miðlunum at røkka út til allar føroyingar - eisini teir sum ikki tendra útvarp og sjónvarp.




# Heimasíðan dagførd

Í 2017 fekk Kringvarpið nýggja heimasíðu við einari meira nútímans brúkaraflatu. Setningurin fyri nýggju heimasíðuna var, at kvf.fo skuldi verða meira nýtsluvinarlig og at tilfarið á kvf.fo skuldi vera lætt at finna fram.

Allar sendingar hjá Kringvarpinum kunnu hoyrast og síggjast beinleiðis á netinum. Sjónvarpið er avmarkað til føroyskt øki vegna rættindi. Allar sendingar hava verið og verða framvegis lagdar á netið, flestar beint eftir, at tær eru sendar.

**HEIMASÍÐAN VÆL VITJAÐ**

Í 2017 vórðu 20.703.416 síður vístar á www.kvf.fo. Hetta talið fevnir um allar síður á heimasíðuni, tað vil siga greinar, sendingar, kunngerðir, andlát og annað. Forsíðan sjálv varð í 2017 víst 5.812.145 ferðir - tað verði seg á teldum, fartelefonum og teldlum. Í miðal vórðu síðurnar á www.kvf.fo vístar umleið 57.000 ferðir dagliga.

**ONNUR LYKLATØL**

- 1.310.836 ferðir opnaðu brúkarar “Beinleiðis útvarp”
- 804.210 ferðir trýstu brúkarar ”Beinleiðis sjóvarp“
- 879.079 ferðir lósu brúkarar ”Andlát“
- 127.290 ferðir opnaðu brúkarar ”Tingvarpið“
- 5 minuttir og 11 sekund vóru brúkarar í miðal á www.kvf.fo

**SAMANBERING**

| | 2016 | 2017 |
|---|---|---|
| **Beinleiðis útvarp** | 998.783 | 1.310.836 |
| **Beinleiðis sjónvarp** | 709.832 | 804.210 |
| **Andlát** | 591.193 | 879.079 |

# Public Service skyldur hjá Kringvarpi Føroya

*„Tað er lógarásett, at kringvarpið eigur at leggja dent á at hava gott føroyskt mál í sínum sendingum og hevur skyldu at tryggja starvsfólkinum holla málsliga ráðgeving.“* *verður sagt í public service sáttmálanum*

**FØROYSKT MÁL Í KRINGVARPI FØROYA**
Kringvarpið er tilvitað um ábyrgdina og týdningin, ið stovnurin hevur fyri føroyska málið. Stremban okkara er, at allar sendingar, ið Kringvarpið framleiðir, eru á góðum føroyskum máli.

Fyri at lúka hesar ásetingar kann nevnast, at vit hava regluligt samband við Føroyamálsdeildina á Fróðskaparsetrinum, og fáa eftir tørvi vegleiðing um málsligar spurningar. Umframt hetta, so hevur Góðan Morgun Føroyar ein regluligan máltátt, har málserfrøðingur greiðir frá, og lurtararnir hava høvið at seta spurningar.

**TÝTT ÚTLENDSKT TILFAR**
Av tí at fíggjarlig orka ikki hevur verið til at týða alt útlendskt tilfar til føroyskt og orsakað av rættindaspurningum, hevur Kringvarpið lagt seg eftir at týða so nógv barnatilfar, sum gjørligt. Tað er umráðandi, at føroysk børn hava atgongd til útlendskar teknifilmar, sum eru týddir til móðurmálið.






Kringvarpið hevur eisini týtt sendingar til vaksin, tó hevur tað í størstan mun verið talan um føroyskan tekst og ikki føroyska talu, eitt nú sendingarnar “Ránsfongur” og “Havsins børn”.

**TÆNASTUR TIL FÓLK VIÐ BREKI**
Tíðindasendingin Dagur og Vika varð deyvatulkað í 2017. Játtanin til Deyvatulking er 585.000 krónur. Sum nakað nýtt verður dokumentarurin hóskvøld tekstaður.

**SENDINGAR ÚTI UM LANDIÐ**
Við Tórði á túri er vikulig sending sum vitjar øll økini í landinum og greiðir frá gerandisdegnum á bygd og í bý. Harafturat eru nógvar av sendingunum hjá Kringvarpinum regluliga kring landið. Eitt nú kunnu vit nevna útvarps- og sjónvarpstíðindini, mánadagsreportasjan, Góðan Morgun Føroyar og aðrar sendingar við. Kringvarp Føroya er fyri allar



Kringvarp Føroya er partur av Tilbúgvingarskipan Landsins

føroyingar, og tí er týdningarmikið, at stovnurin javnan hevur tilfar úr økjunum úti kring landið.

**KEYPTAR FRAMLEIÐSLUR**
Fríyrkisfólk hava staðið fyri meginpartinum av framleiðsluni av vanligu ítróttarsendingunum. Til ítróttarsendingina 3-2 hevur Kringvarpið brúkt fríyrkis fotografar og fríyrkis programmfólk til hvørja sending. Kringvarpið hevur havt góðar royndir av hesi loysn. Guðstænastur og møtir á sjónvarpsskránni hava verið framleidd av fríyrkisfólki gjøgnum drúgt áramál. Morgunlestrar og Heilaga Evangeliið í útvarpinum verða framleidd av fríyrkisfólki, eins og fríyrkisfólk standa fyri stórum parti av tónleikasendingunum í útvarpinum. Deyvatulkingin av Degi og Viku verður gjørd uttan fyri húsið. Eisini verða fríyrkisfólk brúkt í sambandi við framleiðslu av sjónvarpssendingunum, eitt nú sendirøðin Fisk & skips hjá Gutta Winther. Kringvarpið hevur samanumtikið góðar royndir av at keypa tænastur frá fríyrkisfólki til programmframleiðslu.

**FØRLEIKAMENNING OG DYGD**
Kringvarpið hevur hildið fram við arbeiðinum at førleikamenna starvsfólkini innan fyrisiting, tøkni, og journalistik. Starvsfólk fáa møguleikan at koma regluliga á skeið, sum eru viðkomandi fyri teirra arbeiðsøki. Fyri at tryggja dygdina í framleiðslunum hjá Krigvarpinum, verða eftirmetingar javnan gjørdar við uttanhýsis fólki.

Í árligu starvsfólkamenningarsamrøðunum, sum øll starvsfólk taka lut í, verður menning hjá starvsfólkinum umrødd og viðgjørd. Endamálið við hesum samrøðum er, at einstaka starvsfólkið skal fáa høvi at ávirka arbeiðsmenningina ein veg, sum bæði sampakkar við áhugan hjá starvsfólkinum og gagnar Kringvarpinum.

**PARTUR AV TILBÚGVINGINI**
Kringvarpið er partur av Tilbúgvingarskipan Landsins. Avvarðandi myndugleikar hava listar við nøvnum og telefonnumrum, ið skulu nýtast, kemur samfelagið í eina støðu, har brúk er fyri tilbúgving. Tað merkir, at Kringvarpið kann eftir eini lítlari løtu vera við, um eitt ella annað álvarsamt hendir. Kringvarpið hevur nakrar ferðir sent tilbúgvingarútvarp í sambandi við ódnarveður. Sent verður út á kvøldarnar og náttina við, so at fólk kunnu fara til songar við seinastu upplýsingunum í illveðri.

**UNDIRVÍSING**
Kringvarp Føroya og Nám samstarva við at útvega tilfar til skúlar.

Arbeitt verður støðugt við at gera allar sendingar tøkar, soleiðis at undirvísingarstovnar lætt og skjótt kunnu fáa atgongd til tilfarið, sum Kringvarpið framleiðir.

Kringvarpsfólk vitja av og á skúlar, har greitt verður frá um public service, journalistikk og etikk.

KRINGVARP
FØROYA